*Atli Dam, fyrrverandi løgmaður:*

# Neyðtøkuætlan skot fyri bógvin



Jan Müller

Sosialurin hevur biðið tríggjar fyrrverandi løgmenn um at gera viðmerkingar til seinastu samráðingarnar í Keypmannahavn millum landsstýrið og donsku stjórnina.

Atli Dam, fyrrverandi løgmaður javnaðarfloksins er rættiliga bersøgin og avgjørdur: -Tað var eitt sindur hugaligari at fylgja tíðindafundinum á Christiansborg týskvøldið enn seinast, tá føroyingarnir sum óargaligir skúladreingir noktaðu at koma inn aftur í tíman, soleiðis at Poul Nyrup mátti sita einsamallur, harvið tað eydnaðist at skapa fatan av, at hann var harðrendur uttan at hyggjararnir skiltu, at tað var á føroysku hálvuni, at onkur bar seg ósiviliserað at og ikki frúgvin Marianna Jelved á donsku hálvuni.

Annars heldur Atli Dam, at boðskapurin var júst hin sami, men tað, at menn tóktust betur fyri og meira frígjørdir, gjørdi, at endurtøkan tóktist munin meira avklárandi, enn tá boðini vóru framborin fyrstu ferð 17. mars.

-Tað tóktist sum var tað farið at ríva fyri eygum løgmans og Helenu, tí tey tóktust sanna, at tað ber ikki til at hurla slíkar stórbroytingar ígjøgnum í eini handavend. Harvið hevur neyðtøkuætlan Høgna Hoydals eisini fingið skotið fyri bógvin sigur Atli Dam, sum heldur, at Høgni Hoydal tó enn sveimar nakað langt uppi í sínum fantasiheimi, men tað lægri, at skjótt røkka vit upp til føtur hansara og kunnu hjálpa honum at fáa samband aftur við fasta grund, har betri er at standa.

Atli Dam vísir tó á, at vit tá kanska fáa ruddað upp í tí hurlivasa, sum stendst av, at øll fyrisiting er tikin úr vanligum fyrisitingararbeiði og sett at nýta propagandafæ ótálmað í einum ódemokratiskum politiskum talvi.

Fyrrverandi javnaðarløgmaðurin leggur tó aftrat, at tað sum kann harma hann er, at nú er vandi fyri, at talan bert fer at gerast um krónur og oyru.

-Tað hugsjónarliga støðið, sum samvinnan millum tvær javnar tjóðir eigur at byggja á, kámast tá burtur, eisini tann verunleikin, at samvinnan á mangan hátt kundi veitt tjóðini størri frælsi, verunligt lívsfrælsi, heldur enn tað berserkarafrælsi, sum enn tykist einasta boð Tjóðveldisfloksins.

Alt í alt fegnast Atli Dam tó um, at í hvussu er annar parturin skilur, at nógv er, sum kannast skal út í æsir, og at hann vil tryggja sær, at eisini hvør føroyingur fær høvi til at fáa sær fullan kunnleika um málið.

*Atli Dam, fyrrv. løgmaður harmast um vandan fyri, at tað samráðingarnar bara verða ein spurning um krónur og oyru*

*Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgmaður:*

# Fáa eina skiftistíð uppá 8-10 ár

Jan Müller



*Jógvan Sundstein, fyrrv. løgmaður heldur ein framhaldandi blokkur vil oyðileggja samfelagið*

-Eg eri so ómetaliga fegin um handa tíðindafundin. Hann gav eina fatan av, at samráðingarnar hava gingið sera væl og hava verið í einum góðum og positivum anda. Eg upplivdi handa tíðindafundin sum vóru vit nú komnir hálva leið á mál. Alt tilfarið varð gjøgnumgingið, og vit fingu tilsøgn frá stjórnini um mong av málunum. Har vit ikki fingu nakra beinleiðis tilsøgn, søgdu danir seg hugaðar fyri at arbeiða víðari við málunum. Tað einasta, sum nú stendur eftir, er sjálv skiftistíðin, sum eftir útrokningini hjá Nyrup ikki verður fýra menn fimm ár vísir Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgmaður á í eini viðmerking til samráðingarnar og tíðindafundin í Keypmannahavn týsdagin.

-Tá danir vilja hava eina skiftistíð uppá 4-5 ár og vit eina uppá 15 ár, so verður endin helst, at vit fáa eina skiftistíð uppá eini 8 til 10 ár. Man merkti so týðuliga, at hetta var bara ein byrjan til kompromi.

Jógvan Sundstein heldur, at eitt slíkt kompromi vil vera so ivaleyst fyri Føroyar. -Fyri mín part kunnu vit væl taka eina skiftistíð uppá fýra ár ella minni.

Jógvan Sundstein er rættiliga avgjørdur um skiftistíðina og heldur, at verður hon 4 ár ella um so varð 1 ár, so fer hon ikki at fáa nakrar serligar avleiðingar.

*-Men tá búskaparfrøðingar oo. vilja vera við, at ein stutt skiftistíð fær álvarsligar avleiðingar, hvussu kanst tú so koma til nærum tað júst øvugta?*

-Tí búskapurin veksur so ómetaliga skjótt, tá man fær sjálvstýri. Tað er ein náturlóg, at tá man fær ábyrgd og sjálvstýri, so mennist búskapurin sera skjótt.

Jógvan Sundstein heldur tað vera skeivt at brúka vandan fyri lækkandi prísum og vánaligum fiskiskapi sum grundgeving fyri ikki at taka fult sjálvstýri. - Gongur alt ímóti okkum, so fær tað sjálvandi nakrar avleiðingar, og tað fær tað eisini, um vit halda fram við at fáa blokkstuðul.

*-Men er tað ikki sera naivt og bláoygt at siga, at ein stutt skiftistíð ikki fær stórvegis avleiðingar og haraftrat út frá tíðindafundinum í Keypmannahavn at staðfesta, at nú manglar lítið í til vit fáa eina góða avtalu við danir?*

-Tað haldi eg ikki. Ger tú eina skiftistíð uppá 4-5 ár, og tú fær sjálvstýri, soleiðis sum tað varð umrøtt á tíðindafundinum, so vilja vit fáa ein búskaparligan vøkstur við tí ábyrgd man fær, og sum langt uppvigar tað blokkurin minkar við yvir eitt áramál. Men eg dugi væl at síggja, at okkara fólk eru noydd til at fáa eina langa skiftistíð, tí tað vit á donskum rópa „avhengigheitsmentaliteturin" er so fastgrógvið í fólkinum, at tey vilja ikki góðtaka eina stutta skiftistíð.

Uppá fyrispurning um fólkaflokkurin ikki hevur ein trupulleika at dragast við, nú løgmaður higartil hevur valt at koyra eina víðgongda linju, meðan mong fólkafloksfólk út frá veljarakanningunum ikki vilja fara so langt sigur Jógvan Sundstein, at tað eru møguliga nøkur fólkafloksfólk, sum eru ivandi, men flestu teirra eru samd við løgmanni.

Jógvan Sundstein vísir annars aftur, at tað í fólkaflokkinum eru mong vinnulívsfólk, sum ikki nú vilja taka fulla stigið móti fullveldi. -Teir vinnulívsmenn, sum eg hitti og tosi við, teir eru so avgjørt ikki ivandi í hesum máli.

Fyrrverandi fólkafloksløgmaðurin heldur annars, at formaður javnaðarfloksins „datt pladask útí", tá hann gjørdi viðmerkingar til tíðindafundin.

-Hann átti heldur tikið tjansin og sagt, at nú landsstýrið hevur samráðst seg rættiliga langt, so vildi hann vera við í arbeiðinum. Ístaðin verður hann nógv ómøguligari, enn hann hevur verið higartil.

Jógvan Sundstein heldur tað annars vera einki minni enn tvætl, tá menn nú bera ótta fyri okkara rættindum í Danmark, eftir at vit hava fingið fult sjálvstýri.

-Tað er heilt givið, at um vit ikki fáa fult sjálvstýri í Føroyum, so fáa vit eina kreppu aftur. Fáa vit sjálvstýri hava vit nógv betri møguleika at mótvirka eini kreppu. Føroyingar skulu heldur ikki hava nøkur olmussurættindi sum at kunna flyta til Danmarkar specielt undir eini kreppu. Føroyingar hava arbeitt í nógvum øðrum Norðurlondum enn í Danmark, og har hava teir eisini nógv eins góð rættindi sum teir hava í Danmark.

Og at ganga og billa sær inn, at man skal hava nøkur heilt serlig rættindi í Danmark framum norðmenn, sviar og íslendingar er rætt og slætt nakað tvætl.

Jógvan Sundstein heldur ikki, at vit sum er hava nøkur framíhjárættindi í Danmark, sum aðrir norðbúgvar ikki eisini hava. -Eitt nú tá talan er um útbúgving, so er tað h ikki rætt, at vit hava rættindi fram um aðrar. Eg havi gingið á skúla í Danmark saman við norðmonnum og havi ikki havt nøkur framíhjárættindi framum teir.

Jógvan Sundstein heldur, at tað avgerandi nú er, at vit fáa eina loysn, sum er góð fyri føroyingar, og so verður fólkaatkvøðan bara ein formalitetur. -Men vit eru noydd til at hava eina fólkaatkvøðu, tí tað er samtykt í tinginum.

Hann heldur tað er avgerandi, at vit fáa ein loysn skjótt, tí sum støðan er í løtuni, eru nógv mál og spurningar, sum ikki verða nóg væl loystir, tí so nógv orka verður brúkt til hetta eina stóra málið. Hetta er tann negativa síðan av málinum. Vit eru sum er ikki nóg ansin í at røkja onnur øki. Vit eiga at fáa trupulleikar viðvíkjandi sjúkrahúsverkinum og hvørt av sínum loyst sum skjótast.

Jógvan Sundstein heldur annars ikki nógv um tær mongu veljararakanningarnar, sum verða gjørdar. Tær eru sum vindurin blæsir. Tær eru øgiliga ymiskar til ymiskar tíðir, og tí kunnu tær ikki brúkast til nakað. Hann endar við hesum orðum:

-Ein framhaldandi blokkstuðul vil skaka og oyðileggja hetta samfelagið uppaftur meira, og tí mugu vit fáa eina avtalu við danir, sum fær henda stuðulin burtur og sum fær okkum fult sjálvstýri.



*Pauli Ellefsen, fyrrverandi løgmaður:*

# Fólkaflyting við lít um vit fáa eina stutta skiftistíð

*- Møguleikin fyri eini skilagóðari loysn í øllum hesum málinum er tann, at javnaðarflokkurin og sambandsflokkurin finna eina semju og síðani fara út og finna sær ein meiriluta fyri tí. Td. at fáa fólkaflokkin ella sjálvstýrisflokkin við í einum ella øðrum kompromii. Men verður tað loysing verður hópútflyting úr Føroyum. Vit hava jú royndirnar frá fyrst í 90-unum. Tá fóru 7.200 føroyingar av landinum, aftaná at vit høvdu fingið 3 mia. eyka inn í skipanina sigur Pauli Ellefsen, fyrrv. løgmaður*



*Pauli Ellefsen, fyrrv. løgmaður metir ikki blokkin sum nakra gávu men sum ein rætt*

Jan Müller

- Eg trúgvi ikki, at nakar verður kløkkur, tá eg sigi, at eg eri ímóti loysing, sum er tað sama sum fullveldi sigur fyrrverandi løgmaður fyri sambandsflokkin Pauli Ellefsen, nú vit biðja hann um eina viðmerking til samráðingarnar í Keypmannahavn og gongdina í hesum máli.

- Eg kann annars bert siga, at tað kemur greitt til sjóndar, at Nyrup hevur bæði danska fólkatingið og í størri og størri mun danska fólkið aftanfyri seg. Føroyingar skulu tí gera upp við seg sjálvar, um vit vilja taka fulla stigið og gjalda fyri tað. Tá tað snýr seg um skiftistíðina, so er mín metting tann, at 5 ár er ein sera long skiftistíð. Fyri mær at síggja er blokkurin als ikki nakar stuðul. Hann er ein avtala og skylda, sum Danmark hevur til at gjalda ein ávísan part av felagsútreiðslunum.

Pauli Ellefsen vísir m.a. á, hvat Anders Fogh Rasmussen og aðrir Vinstrimenn hava sagt, at føroyingar mugu gjarna yvirtaka, men tá mugu føroyingar eisini gjalda. Út frá filosofiini um at blokkurin ikki er ein gáva men ein skylda og ein rættur, so meini eg, at tað átti als ikki at verið talan um nakra skiftistíð. Tá er tað ístaðin spurningurin um, at vit yvirtaka frá tí og tí degi og gjalda samtíðis fyri tað.

*- Tað eru mong, sum siga, at blokkurin avlagar føroyska búskapin og forðar fyri eini náttúrligari menning?*

- Eg eri ósamdur. Grundgevingin er tann, at vit skulu fáa ta hálendsku sjúkuna. Og hon er eyðkend við, at lønirnar blíva ov høgar. Og lønirnar í Føroyum eru nettupp nógv lægri enn í Danmark. Tí meini eg, at tað er einki sum vísir, at blokkurin hevur avlagað búskapin. Blokkurin hevur gjørt, at vit eru fleiri føroyingar í Føroyum, enn vit høvdu verið, um vit ikki høvdu blokkin.

Fyrrverandi sambandsløgmaðurin vísir á, at tað snýr seg so sanniliga ikki bara um blokkin. - Nakað annað er ríkisborgararætturin og rættindini í Danmark, og tey telja í míni verð enn meira enn blokkurin.

*- Nú vísir tað seg sum ein partur av rákinum er at fáa okkum størri sjálvstýri. Hevur tú ikki sjálvur nakran tjóðskaparliga stoltleika, sum sigur tær, at her mugu broytingar til?*

- Eg havi sjálvur havt ta æru at siga í løgmansstólinum í fýra ár. Frá okkara monnum hoyra vit nú, at teir verða trýstir av øðrum og at teir ikki vilja finna seg í tí osfr. Tey fýra árini í Tinganesi upplivdi eg ongantíð at verða trýstur av dønum. Trýstið, sum lá á okkum, kom frá ES. Og tað hevði verið uppaftur størri, vóru vit ikki í ríkisfelagsskapi. Eg veit ikki, hvat tað er man vil sleppa at betemma sjálvur. Man tosar um ST og annað. Eg havi verið har í ein mánað, og kann als ikki síggja, at vit føroyingar hava nakran stóran leiklut at spæla sum sjálvstøðug tjóð í ST. Eg síggi einki virði í. Eg fari ikki út um morgunin og stari meg blindan í nationalismu og tí føroyska flagginum. Flaggið er eitt symbol uppá Føroyar. Skuldu føroyingar gjørt sær fyri skommum, so gongur tað út yvir flaggið. Flaggið ger okkum ikki fyri skommum.

Pauli Ellefsen heldur annars, at møguleikin fyri eini skilagóðari loysn í øllum hesum málinum er tann, at javnaðarflokkurin og sambandsflokkurin finna eina semju og síðani fara út og finna sær ein meiriluta fyri tí. Td. at fáa fólkaflokkin ella sjálvstýrisflokkin við í einum ella øðrum kompromii.

- Men verður tað loysing, so ivast hann ikki í, at tað verður hópútflyting úr Føroyum. - Vit hava jú royndirnar frá fyrst í 90- unum. Tá fóru 7.200 føroyingar av landinum, aftaná at vit høvdu fingið 3 mia. eyka inn í skipanina.

*- Men heldur tú ikki, at føroyingar eru so tjóðskaparliga stoltir, at teir fegnir vilja lata nakað av vælferðini fyri at kunna gerast sjálvstøðugir?*

- Nei. Vit hava fleiri dømi um, at hetta er ikki so. Tí var tað støðan, so skuldu teir longu nú havt sett lønirnar niður. Vit sóu eisini, hvat fiskimenninir gjørdu nøkur ár herfyri. Teir søgdu, at fingu teir ikki ein eyka skattalætta, so tóku teir konu og børn til Noregs. Eg trúgvi ikki uppá, at føroyingar fara at góðtaka uppá sikt at hava tað nógv verri enn fólkið í grannalondunum. Og tað, sum kann loysa upp fyri hesum, skulu vit hava loysing, er tann, at umleið 15.000 til 20.000 føroyingar flyta. Tá kann restin hava tað rímuliga gott.

Annars heldur fyrrv. sambandsløgmaðurin, at orðaskiftið er vorðið meira seriøst nú. - Í dag finnur tú nevniliga ikki ein búskaparfrøðing, sum ikki sigur, at vit missa nógv, um vit loysa. Landsstýrið sigur, at teir vilja ikki gera nakað, sum ger, at føroyingar verða ótryggari. Men hvussu tú skal taka helvtina av búskapinum úr einum landi, og garantera fyri, at føroyingar eru líka flinkir, tað er nakað, sum fer forbí mín forstand.

Tað, sum Pauli Ellefsen annars er mest fegin um eftir hetta samráðingarumfarið, er, at tað er komið so týðuliga fram, hvørji rættindi vit missa, um vit sleppa ríkisfelagsskapinum.

*- Hevur landsstýrið ein trupulleika, um danska stjórnin ikki vil víkja frá skiftistíðini uppá 4 ár?*

- Tað skal bara út og siga Føroya fólki, at innan hesa tíð er helvtin av búskapinum vekk, og áttu teir út frá tí at sett fólk til at rokna nærri út, hvat tað merkir.


SUMMARMÓTAFRAMSÝNING Á HOTEL NORÐ

Nú summari nærkast og tey nýggjastu klæðini eru komin heim, er møguleiki at koma til

**SUMMARMÓTASÝNING**

**Leygarkvøldið 6/5 2000 kl. 19.00**



Komið og síggið hvat er frammi nú.
Til matna verður kalt borð.
Tað er eisini møguleiki at gista
fyri ein rímiligan prís.

Bílegging á tel. 451244 ella 451093 og fax 451245 í seinasta lagi fríggjadagin kl. 12.00

**Hotel Norð**

Tel. 451244 - Fax 451245 - FO 750 Viðareiði

Sosialurin - 311820